







# Ein trygd og treyt fyri vælferð



Val x

HANS PAULI STRØM
Javnaðarflokkurin

Tú sum ert ungur, og hevur tørv á opnum, góðum møguleikum. Tú sum ert tilkomin við ábyrgd fyri familju og heimi og hevur tørv á vælvirkandi skipanum á øllum samfelagsøkjum. Og tú sum ert eldri og hevur tørv á tryggum umstøðum og góðari umsorgan, tá tínar egnu kreftir ganga undan.

Tað er ein serlig grund til at seta krossin við Javnaðarflokkin á fólkatingsvalinum.

Tað snýr seg um okkara vælferð, aðalmerkið hjá Javnaðarflokkinum - tað vit raðfesta fram um alt annað. Serliga hugsi eg her um heilsuøkið, almannaøkið og skúlaøkið.

Við støði í egnum kreftum hava vit megnað at bygt eitt sterkt og gott vælferðarsamfelag í Føroyum, sum á flestu økjum stendur mát við hini norðurlendsku vælferðarferðarsamfeløgini, tey bestu í heiminum.

Men tað svitast ikki, at við so lítlum fólkagrundarlagi sum okkara, klára vit okkum aldrin uttan eitt tætt og vælvirkandi samstarv úteftir, eitt ítøkiligt, dagligt samstarv um okkara vælferð. Her kunnu vit fegnast um teir óavmarkaðu møguleikarnar fyri samstarvi úteftir sum vit hava í ríkisfelagsskapinum. Hetta er eitt samstarv, sum eg dag og dagliga í mínum starvi sum landsstýrismaður síggi tann ovurstóra týdningin og fyrimunin í.

Tí heldur Javnaðarflokkurin ósvikaliga fast við samstarvið í Ríkisfelagsskapinum.

Hugsa bara um samstarvið við Ríkissjúkrahúsið, hetta er rætt og slætt ein lívsæðr úteftir fyri føroyska sjúkrahúsverkið. Tað er júst út frá hesum tørvinum, at vit nú eru farin undir arbeiðið við at útvega okkum eitt nýtt og betri sjúklingahotell í Keypmannahavn.

Alt hetta merkir ikki, at vit í Javnaðarflokkinum bara venda eyguni móti Keypmannahavn. Nei eisini tá tað snýr seg um at slóða fyri samstarvi aðrar vegir, gongur Javnaðarflokkurin undan. Tak t.d. okkara nýggja samstarv við Ísland á heilsuøkinum, sum verður skipað nú í heyst. Og nú eru vit eisini farin ígongd við at fáa eitt nýtt og spennandi samstarv í lag á heilsuøkinum við okkara stóra granna fyri sunnan, Skotland.

Í internationalum politikki stendur norðurlendska vælferðarsamfelagið sum eitt vinnarasamfelag, ikki bara í vælferð, men eisini fyri vinnuliga nýskapan og búskaparligan vøkstur. Tá er vert at hugsa um, at hetta norðurlendska vælferðarsamfelagið jú er sprottið úr og bygt upp eftir tí javnaðarpolitisku samhaldsføstu hugsjónini. Tí leggja vit eisini stóran dent á sosialdemokratiska samstarvið, í ríkisfelagsskapinum og í norðurlendska samstarvinum. Ongastaðni sum har setir man politisku dagsskránna fyri støðugari endurnýgging av norðurlendsku vælferðarskipanini - fyri at møta dagsins og framtíðarinnar avbjóðingum fyri okkara vælferð.

Í valstríðnum sum nú leikar á, í Føroyum og í Danmark, seta Javnaðarflokkarnir tína og fólksins vælferð ovast á politisku dagsskránna. Hetta er tann grundin eg vil vísa tær á, til at seta krossin við Javnaðarflokkin á fólkatingsvalinum.

# Nýggj byrjan og verulig úrslit



Val x

JOHN JOHANNESSEN
www.john.fo

**Vel eina nýggja byrjan. Vel veruligu javnaðarvirðini. Vel John á Fólkating**

Vilt tú venda konfrontatión til dialog? Vilt tú venda gerðarloysi til virkisfýsni? Vil tú víðka okkara rásarúm úti í heimi og taka altjóða ábyrgd? Vilt tú hava eina nýggja byrjan? So er eitt at gera. At velja Javnaðarflokkin á fólkating týsdagin.

Fyri tína atkvøðu lovi eg tær eina nýggja byrjan. Tað er avgerandi neyðugt fyri vælferðina, at vit fáa ræði á okkara egna uttanríkispolitikki. Tí vil eg sum fólkatingslimur virka fyri einum heilt nýggjum samstarvi við danir á jøvnum føti. Einum jøvnum samstarvi, har føroyskar avgerðir verða tiknar í Føroyum á føroyskum grundarlag.

Søguliga hevur Javnaðarflokkurin altíð staðið fyri teimum framstigum, sum eru tikin á sjálvstýrisleið. Avgerðirnar eru altíð tiknar, tá tær hava verið neyðugar fyri menningina av samfelagnum. Vit slóðaðu fyri slóðbrótandi Heimastýrislógini í 1948. Vit yvirtóku ráevnini í undirgrundini í 1992. Vit áttu yvirtøkulógina í 2005. Nú er aftur ein nýggj byrjan neyðug.

Vel eina nýggja byrjan. Vel veruligu javnaðarvirðini. Vel John á Fólkating.

# Svínoy og Fugloy mugu fáa nýtt skip til farleiðina skjótast



Val x

JOHAN DAHL
løgtingsmaður
Sambandsflokkurin

Eg havi mangan hildið at vit suðringar hava latið ov nógv um okkum farið uttan at bitið nóg nógv frá okkum , hóast okkara temperament, men má ásannað at arðir tolnir útoyggjabúgvar eisini eru í hesum landið.

Nú hevur Másin verið á sleipistøð í Vági í nakrar vikur og má eg viðganga, at hetta skipið kunnu vit als ikki bjóða teimum sum ferðast til Svínoyar og Fugloyar ,- tíðin er snøgt sagt farin frá hesum skipið sum ivaleyst hevur verið gott og tænt fyri sítt breyð.

Nú vit hava sett út í kortið at gera eina Nólsoyarferju, vil eg mælað til, at vit kannað hjá meklarum sum selja ferjur og finnað eina hóskandi, góða ferju til Svínoyar- og Fulgoyarleiðina.

Tað finnast uttan ivað góð skip við fáum árum á baki sum høvdu verið væl egnað til hesa farleið.

Lat okkum fáa avseta neyðugu upphæddirnar av til hesi skip komandi og næstkomandi ár.

# Lat tey hóma dalar og fjøll



Val x

JÓNLEIF JOHANNESEN
Valevni hjá Javnaðarflokkinum

Í míni lestrartíð í Keypmannahavn merkti eg støðugt, hvussu Føroyar gleið longur og longur burt úr huganum. Eftir hvørt ár sum fór, hevði eg verri og verri við at minnast Føroya kláru heystluft, merkja angan av fullum hoggjhúsum, merkja smakkin av rundstykkjum frá Frans o.ø.

Vit vóru fleiri á Oyrasundskolleginum við somu støðu, og royndu vit, hvør sínum lagið, at halda sambandið við tað, ið føroyskt var.

Vit gjørdu eitt miðvíst arbeiðið í ÍF Føroyum. Har megnaðu vit at lyfta felagið uppá eitt slíkt støðið, at fleiri okkara fóru beint heim í bestu føroysku deildina. Eitt nú, Mikkjal Thomasen, Herbert í Lon, Eyðun Højgaard, Jan Dam, John Heri Dam, Niklas Niklasen og aðrir. Tá vóru vit stoltir. Vit høvdu knýtt eitt band heim aftur á klettarnar.

Eisini í Føroyahúsinum virkaðu vit. Dansifelagið Fótatraðk, sum kendi seg so eina og rótleyst fekk nýggjan stuðul. Vit megnaðu at bera so í bandi, at Fótatraðk kom inn undir veingjabreiðið hjá Sláið Ring. Tá vóru vit ovurfegin. Hetta var gott fyri Fótatraðk og ikki minst fyri føroyskan dans sum heild, tí tilgongdin av ungum fólki hevur verið støðugt veksandi síðani.

Mínir dagar sum lesandi í Keypmannahavn eru taldir, men rita í minni er ein rík tíð. Umframt hesi góðu minnir, stendir eisini kenslan av, at tað var tung at fáa nakra hjálp heimani frá. Vit vildu virka fyri sterkari bondum millum okkum lesandi niðrið og heimlandið, men langt frá allar hurðar fóru á glopp, minni enn so.

Eitt javnaðarumboð á Fólkatingi, fer av øllum huga, at virka fyri, at okkara ungdómur, sum í stóran mun heldur til í Danmark, fer at kenna seg tættari Føroyum.

Javnaðarumboðið vil virka fyri, at knýta bond millum okkara ungdóm á flatlondum og menturarøkini í Føroyum. Slík bond mangla í dag.

Slík bond tæna Føroyum í allar mátar. Slík bond kunnu gera munin tá Føroyar skal veljast fram um onnur lond.

Styrkið land okkara.
**Setið x við Javnarflokkin**

Sosialurin
Sosialurin i